# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*-Drápið á FARC-leiðaran Reyes var ikki ein krígsatgerð, men eitt væl skipað og ísakalt morð*
*(Hugo Chávez)*

# Dagurin í dag kann gerast søguligur

**Barrack Obama hevur vunnið tey seinastu 11 valini, og hann ætlar sær eisini at vinna tey fýra, sum eru í dag**



*Vinnur Hillary Clinton ikki uppstillingarvalini í dag, kemur hon neyvan aftur í Hvítu Húsini á hesum sinni*
*(Mynd: AP)*

Dagurin í dag kann gerast avgerandi fyri, hvørt tað verður Hillary Clinton ella Barrack Obama, sum verður forsetavalevni hjá amerikonsku demokratunum í heyst. Ikki færri enn 370 valmenn eru at kappast um á dagsins uppstillingarvalum í Texas, Ohio, Vermont og Rhode Island.

Sunnudagin høvdu tey bæði valevnini fundir í Ohio. Meiningakanningar hava víst, at Hillary Clinton er eitt vet framman fyri Barrack Obama í Ohio, meðan tað stendur á jøvnum teirra millum í Texas. Fyri bara nøkrum fáum vikum síðani var Hillary Clinton á odda í báðum statunum, og leingi var tað líkt til, at tryggir sigrar har kundu bjarga henni uppstillingina. Men nú er alt broytt.

Ta seinastu tíðina hevur Barrack Obama dugað betur at savna pening til sítt valstríð, og pengarnar hevur hann brúkt til dýrar sjónvarpslýsingar og ymisk onnur átøk, sum skulu fáa fólk at velja hann.

Politiskir eygleiðarar í USA eru á einum máli um, at dagurin í dag kann fáa avgerandi týdning fyri uppstillingina hjá demokratunum, og teir eru samdir um, at vinnur Hillary Clinton ikki í Texas og Ohio, hevur hon smáar møguleikar fyri at gerast forsetavalevni í heyst.

### D-dagur

Orðalagið millum tey bæði valevnini hevur verið munandi hvassari í seinastuni, men tað hóvar ikki øllum. Fleiri demokratiskir politikarar hava mælt teimum báðum til at vanda sær betur um orðini.

Millum teir atfinningarsomu er guvernørurin í New Mexico, Bill Richardson. Hann mælti í gjár Hillary Clinton og Barrack Obama til at binda frið heldur enn at spilla hvør annan út.

- 4. mars er D-dagur, og aftan á tann dag skulu vit hava eitt jaligt valstríð. Hevur annað valevnið fingið væl fleiri valmenn aftan á hendan dagin, eiga demokratarnir at tilnevna viðkomandi forsetavalevni í heyst, segði Bill Richardson.

Undan valinum í dag hevur Barrack Obama 1.385 valmenn, og Hillary Clinton hevur 1.276. Fyri at vinna uppstillingina á landsfundinum í august skal annað teirra fáa minst 2.025 valmenn.

### Óvissa í Ohio

Meiningakanningarnar í Ohio hava víst sera ymisk úrslit. Ein kanning sigur, at Hillary Clinton fær 47 prosent av atkvøðunum, og at Barrack Obama fær 43, men ein onnur sigur, at hon fær 56 prosent og hann 40.

Hillary Clinton legði lutvíst á annan bógv um vikuskiftið, tá hon valdi at gera meiri burtur úr trygdarpolitikkinum enn frammanundan. AP heldur, at hon ger tað fyri at vísa á, at hon hevur munandi drúgvari royndir á tí uttanríkispolitiska økinum enn Barrack Obama. Hon vísti á, at Barrack Obama kann ikki standa seg í einum dysti við John McCain, sum uttan iva fer at brúka sínar hernaðarligu royndir og ikki minst leiklutin sum krígsfangi.

Uppstillingin hjá republikanarunum tykist langt síðani avgjørd. John McCain hevur útvegað sær 1.014 av teimum 1.191 valmonnunum, sum eru neyðugir fyri at vinna uppstillingina hjá republikanarunum.

# Flogfar mundi dottið niður av einum vindblaki

**Tað var um reppið, at eitt týskt flogfar við 137 fólkum umborð datt niður, tá tað fekk eina hvirlu undir lending í Hamburg um vikuskiftið**




*Flogfarið fór tvørtfyri av vindblakinum, men tað eydnaðist flogskiparanum at fáa tað uppaftur*
*(Mynd: LiveLeak)*

Tey 137 fólkini umborð á Airbus-flogfarinum úr München til Hamburg leygardagin fara seint at gloyma sekundini, tá eitt vindblak sendi flogfar teirra til viks, júst sum tað var á veg niður ímóti lendingarbreytini í Hamburg.

Flogskiparin hevði ilt við at halda javnvág á flogfarinum, so hann gjørdi av at taka tað upp frá aftur heldur enn at royna at seta tað á flogvøllin. Týska loftferðslueftirlitið sigur, at flogskiparin tók ta einastu røttu avgerðina. Hevði hann royndt at seta flogfarið á vøllin, kundi tað enda í einari sannari vanlukku, sigur ein talsmaður fyri loftferðsluefirlitið við blaðið Stern.

## STUTT SAGT

### USA keypir Airbus

Heldur óvæntað hevur amerikanska herleiðslan gjørt sáttmála við evropeisku flogverksmiðjuna EADS um nøkur brennievnisflogfør til amerikanska flogvápnið. EADS-verksmiðjan er serliga kend fyri síni ferðamannaflogfør av slagnum Airbus. Í hesum førinum er talan um flogfør, sum skulu lata øðrum flogførum brennievni, meðan tey eru á flogi. Vanliga keypir amerikanska hermegin flogfør frá amerikonsku verksmiðjuni Boeing, og eygleiðarar siga, at tann nýggi sáttmálin er eitt álvarssamt bakkast fyri Boeing. Eftir sáttmálanum skal evropeiska verksmiðjan byggja amerikanska flogvápninum 179 brennievnisflogfør.

### Gazprom skrúvar aftur

Russiska gassfelagið Gazprom hevur enn eina ferð snarað krananum, sum sendir gass til grannalandið Ukraina. Tað hendi gjáramorgunin, og orsøkin er enn eina ferð ósemja um prísin á gassinum. Sambært Gazprom fáa ukrainar nú 40 milliónir rúmmetrar av gassi minni um samdøgrið, men at broytingin fer ikki at ávirka russiska gassflutningin til lond í Evropa.

### Kina ger vart við seg

Afrika er í ferð við at gerast ein sera týðandi samstarvsfelagi hjá Kina á búskapar- og vinnuøkinum. Tíðarritið Beijing Review skrivar, at meiri enn 800 kinesiskar fyritøkur eru virknar í Afrika, og at samhandilin millum Kina og lond í Afrika liggur um 100 mia. dollarar um árið. Eitt nú eru kinesiskar fyritøkur við til at gera íløgur í málmvinnuna í londum sum Suðurafrika, Zambia og Demokratiska Lýðveldinum Kongo, meðan aðrar fyritøkur gera íløgur innan landbúnað, orku og samskifti. Í Sudan hevur Kina gjørt stórar íløgur í oljuvinnu, og 80 prosent av oljuni, sum Sudan sendir av landinum, fer nú til Kina, skrivar Beijing Review.